Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

Persónlig menning og Leiðsluamboð

Assertión - støðufesti
Oktober 7; 9; 21; 23; 28. kl. 16.00-20.00
Innihald
- at læra um assertiónsástøði - at arbeiða við sær sjálvum
- at læra meira um títt egna virði og sjálvsvirði
- at verða betur førur fyri at taka avgerðir og taka ímóti atfinningum
- at seta og avvísa krøv
- at loysa ósemjur og trupulleikar bæði til arbeiðis og heima

Nevndararbeiði og fundarteknikkur
November 4; 6; 11; 13. kl. 16.00-20.00
Innihald
- at geva luttakarunum førleika at brúka fundir sum virkið nevndararbeiðsamboð
- at gera fundirnar styttri, úrslitagóðar, demokratiskar, elva til dialog og trivna
- at gerast betur førur fyri at taka ímóti og arbeiða við upplýsingum, orða og geva víðari upplýsingar fyri at tryggja eitt høgt informatiónsstøði í virkinum/nevndini

Leiðsla og samstarv
November 18; 20; 25; 27. kl. 16.00-20.00
Innihald
- arbeiðs- og samarbeiðshættir
- fyriskipan og virkismentan
- grundreglur, bólkabygnaður- og menning
- at leiða og fordeila, samvirka- og starva
- góð/vánalig leiðsla, starvsfólkasamrøður

Lesið meira um skeiðini á okkara heimasíðu **www.skeidsdepilin.fo** ella ringið á tel. 318813 um nærri upplýsingar

Tilmelding: Í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðsbyrjan
Skeiðini verða hildin treytað av, at nóg nógvir luttakarar tekna seg.

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn,
Tel 318813, Fax 313374

ísam 85 • 35800

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3656
Navn: Sp/f 3'arin
Adressa: Sølumiðstøðin, Box 1057-1058, 110 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 22.09.2003
Viðtøkudato: 22.09.2003
Kapitalur: Kr. 200.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 50.000,00 til kurs 100 og kr. 150.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Sp/f 3-arin Holding, 100 Tórshavn (Sp/f 1677) og Sp/f Høgni Zachariasen Holding, 100 Tórshavn (Sp/f 3657).
Nevnd: Gissur Paturssson, Tórugøta 14, 100 Tórshavn (formaður), Høgni Zachariasen, Niðaragøta 2, íbúð 4, 188 Hoyvík og Hans Erik Korsgaard, Millum Gilja 43, 188 Hoyvík.
Stjórn: Høgni Zachariasen, Niðaragøta 2, íbúð nr. 4, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av tveimum nevndarlimum saman ella allari nevndini í felag.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.04. - 31.03.
Fyrsta roknskaparár: 01.04.2003 - 31.03.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 24. september 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 271, Sp/f Búgv, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 14.07.2003.
Nýtt hjánavn: Sp/f Bólið (Sp/f Búgv)

Skráseting Føroya tann 24. september 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 1677, Sp/f 3-arin, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 22.09.2003.
Nýtt navn: Sp/f 3-arin Holding

Skráseting Føroya tann 24. september 2003

Kristin Balle

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið "Nýggjur innkomuvegur til Havnar, 1. stig", við tilhoyrandi arbeiðsvegi frá Flatarvegnum, boðið út í almenna lisitatión.

Innkomuvegurin 1. stig, longd uml. 350 m, og arbeiðsvegurin longd uml. 220 m

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 30.september 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 9181-134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

Lisitatiónin verður hjá Landsverkfrøðinginum, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, hósdagin 16. oktober 2003 kl. 14.00.

Adressa: Landsverkfrøðingurin, Tinghúsvegur 5, Postboks 78, 110 Tórshavn, Telefon 311333, Telefax 314986, Teldupostur eli@lv.fo

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

Avloysari fyri leiðandi ergoterapeut á Lágargarði

Í tíðini frá uml. medio januar 2004 til 01. juli 2004 verður søkt eftir avloysara fyri okkara leiðandi ergoterapeut, sum fer í barnsburðarfarloyvi.

Starvið er fulltíðarstarv og lønt sambært sáttmála ímillum felagið Føroyskir Ergoterapeuta og Fíggjarmálaráðið.

Umframt leiðarauppgávurnar eru eisini ADI metingar og venjingar, fyribyrgjandi venjingar og viðlíkahaldsvenjingar. Vegleiðing og upplæring í nýtslu av ergonomiskum hjálpartólum til brúkara og starvsfólk.

Umsóknir við neyðugum prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til leiðaran á Lágargarði, Stoffalág 84, Box 1188, 110 Tórshavn.

Meira fæst at vita ums tarvið við at ringja 316788.

Umsóknarfreistin er til 20. oktober 2003.

Grót fæst

við at koma eftir tí.

Tlf. 216600 ella 215609

Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

Lágargarður lýsir eftir sjúkrarøktarfrøðingum

Lýst verður eftir **ábyrgdarhavandi sjúkrarøktarfrøðingi í náttarvakt**, helst við lønarbrøki 0,6, men er áhugin fyri minni brøki, eru vit til at tosa við um tað.

Somuleiðis lýsa vit eftir **sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða í kvøldvakt** við lønarbrøki 0,5 á Miðstovu.

Bæði størvini eru lønt sambært sáttmála ímillum felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið og kunnu setast skjótast tilber ella eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja 316788 og skulu umsóknir við prógvum sendast til leiðaranum á Lágargarði, Stoffalág 84, Box 1188, 110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er til 15. oktober 2003.

---

fk Matseðilin

Fríggjadagin 26. sept:
Hakkibúffur

Leygardagin 27. sept:
Rullusteik

Mánadagin 29. sept:
Kjøtbollar í karrysós

Týsdagin 30. sept:
Hamburgarryggur

Mikudagin 1. okt:
Grýturættur

***

Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:

Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 30,00

Matstovan í Hoyvík

FISKIMÁLARÁÐIÐ
FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

1. meistari til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum 1. meistari við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, til setan skjótast gjørligt.

Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur:
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

Førleikakrøv:
- Vinnubrævi sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi *(STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer).*
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa
- Aldur og heilsu til at gerðast kavari. Fyrimunur men ikki krav.

Setanartreytir:
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. meistari.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir:
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnibrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 10. oktober 2003 kl 1200.

Umsóknirnar skulu sendast til :

Fiskiveiðieftirlitið, postsmoga 347, 110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.

---

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Sosialurin

Alt vanligt timburarbeiði verður gjørt

Hjálp verður eisini veitt við húsatekningum - ring og avtala eitt óbindandi húsaprát!

GARDAR smíð

Tel 42 15 53
Far 21 57 88
Fax 42 17 88

SISMIKO 351800